VI‹MERKINGAR

Teir mistu einki á gólv! Nei, teir blaka›u medvitandi alt frá sær

Rolf Guttesen

Ongantí› hava fólk sæ› eitt slíkt samanbrot og skrædl fyri snurrandi sjónvarpstólum, sum tann tragedian, sum var framførd á Christiansborg hóskvøldi› 26. oktober ár 2000. Men her er einki at flenna at. Hetta er stutt og gott, ella langt og ringt, ein sorgarleikur, sum rakar allar føroyingar bæ›i burturi og heima, bæ›i sambandsmenn og sjálvst‡riskvinnur.

Hetta var so Føroya Landsst‡ri, valt demokratiskt av einum meiriluta av føroysku veljarunum, sum var fari› í Kongsins b‡ at fáa síni avgerandi politisku ynski uppfylt. Í meira enn tvey ár hevur øll orka veri› sett inn í eina "fullveldisætlan", sum skuldi fáa fólki› undan fremmandari kúgan, og so helst eisini útvega eina flaggstong í New York.

Ni›urstø›an, nú hæsa› er av, má vera, at har var okkurt heilt gali›. Antin vi› ætlanini, solei›is sum hon var løgd til rættis av fullveldislandsst‡rinum, ella vi› teim monnum og kvinnum sum skuldu samrá›a tingini uppá pláss. Um verkætlanin var gó› ella ring? Ta› er ein politiskur spurningur!

Tær politisku tingingarnar og avger›irnar eru í seinasta enda alt avgerandi.

Sendinevndin kundi fingi› ein sáttmála um fullveldi heim vi›, um teir vildu ella tordu. Nyrup hevur í hesum máli allatí› veri› púra klárur: "Ta› er í lagi, um Føroya fólk vil ta› so. Vit fara ikki at seta okkum ímóti eini demokratiskari avger›. Men so er stø›an millum londini broytt; ta› er ikki ókeypis at taka fullveldi."

Politikkur er ikki eitt divideri-roknistykki

Fullveldislandsst‡ri›, vi› einum varaløgmanni á odda, hev›i eina turkatrúgv uppá, at tær røttu útrokningarnar og framskrivingarnar kundu siga, nær tann føroyski búskapurin var› bur›ardyggur. Ta› ber væl til at gera strikumyndir um búskapargongdina og mangt anna› langt inn í framtí›ina.

Men hetta er ein teoretiskur fimleikur, sum líti› og einki hevur vi› veruleikan at gera. Eingin kann siga naka› serligt vi› skili um, hvussu stø›an er um 5, 10 ella 15 ár. Ta› kunnu fiskifrø›ingar heldur ikki.

Ta› er faktiskt sta›fest vi› lóg, at so er. Ja, føroyskari løgtingslóg! Ikki ber til at gera eina ætlan, sum bara heldur eitt ár fram. Tí hevur man Eykafíggjarlógina til at lappa holini vi›. Tí avvísti danska stjórnin - sjálvandi - at vera uppi í einum divideri-roknistykki, sum "objektivt" skuldi siga teimum, hvat teir áttu at gjalda føroyingum í 15 ella 80 ár. Slíkt kunnu bara óroyndir amatørar finna uppá.

Útbrendar teoriir og hugsjónir kasserast!

Ta› var ein klókur heimsspekingur, Karl Popper, sum seg›i, at ta› ikki kom ann uppá at prógva teoriir. Hvørki vísindaligar ella politiskar. Ta› var meiri umrá›andi at forkasta tær og blaka tær burtur. Og hann hevur so púra rætt. Heldur tú fast um gamlar teoriir og eisini politiskar ideologiir, so stir›nar samfelagi› og doyr til endans.

Breznev og Ciaucescu hildu fast um sínar ideologiir, og høvdu nevndir og stovnar í hópatali til at finna tey vísindaligu prógvini. Teir vildu einki forkasta av avolda›um stalinistiskum tankagó›si. Tí eru teir strika›ir av landkortinum í dag.

Er tí›in ikki komin til at forkasta ymist forolda› national-romantiskt tankagó›s og tokutos, sum hevur plága› føroyskan politikk í mong ár? Kærleikin til heimlandi› hev›i helst trivist væl frægari uttan hetta hálvfeudala, og til tí›ir hálvfascistiska, svassi›.

Sami Popper var eisini ímóti teim altumfatandi samfelagsligu kollveltingunum, sum ein ideologi roydni at gjøgnumføra, ta› veri seg leninisma, stalinisma, nazisma ella naka› anna›. Ta› fór at enda gali›. Nettup tí, at ta› ikki ber til at siga framman undan, hvussu umfatandi broytingar fóru at virka. Frægari var at hava ein stigvísan politikk, sum hann kalla›i "piecemeal social engeneering", ella ein stigvísa samfelagsliga tilgongd. Tak problemini, sum tey eru, finn eina loysn. Tak tey næstu, finn eina loysn osfr.

Ov stórur biti?

Fullveldislandsst‡ri› vildi hava alt nú, her og beinanvegin! Milliónir í 15 ár, suverenitet, partnership og Drotning, øll saksøkir alt fyri eitt, samstundis skuldu føroyingar hava somu rættindir í Danmark, sum higartil. Fingu teir ikki ta›, so vóru danir nøkur reyvarh....!

Sum tí›in lei›, og samrá›ingarumførini ikki vóru fullveldismonnum til vildar, so øktist mismóti› og desperatiónin. Ætlanin hev›i veri› at koma heim bæ›i vi› posa og sekk, og siga: Hygg! fari› tit nú á fólkaatkvø›u og gevi› okkum atkvø›una, so fáa tit "fullveldi"!

N‡ggju rá›ini: Provokatión og Konfrontatión

Men gakk. Hetta var torførari enn vænta›. Stígur kom í "processina". N‡ggj rá›ager› var› løgd. Nú skuldi streingjast har›ari á. Kósin bleiv: Provokatión!! Konfrontatión!! Og hvørja fer› Ríkisstjórnin so fór at siga, at hetta hava tit, sambært galdandi lóg, ongan rætt til at gera, so geyla vit bara: "Hygg vit sleppa einki at gera, teir vilja bestemma alt. "

So komu brøvini til ST, og til Nato og royndirnar at fá ein 3. part uppí sum eyglei›ara. Og snakki› um Partnership for Peace (Eitt pent navn; men hetta er búri› vi› teim óst‡rligu villhundunum í bakgar›inum hjá Nato).

Hetta var at fara út um mark. Teir vistu av tí. Men, sum a›ir hundar, so ‡ldu teir allir, sum avrátt var.

Men ta› var eitt tilætla› skrædl

Oktoberskrædl, kaos, cirkus. Solei›is sá ta› út, men hetta var alt planlagt og tilætla› frammanundan. Sosialurin refererar frá tí›indafundi í Landsst‡rinum á›renn teir fóru avsta›, "Anfinn Kallsberg metti ney›ugt vera, at koma burturúr donskum statsrætti og yvir í fólkarætt." Sama stendur eisini í talunotatinum hjá Løgmanni til samrá›ingarfundin.

Dekan og seint er beint undan 4. samrá›ingarumfar at hálsa um, og bráddliga royna at umdefinera landsins stø›u. Enntá til naka›, sum er bæ›i skeivt og provokerandi. Men medvitandi provokerandi. Hetta skuldi skapa konfrontatióna.

Teir vistu fullvæl, at teir ikki høvdu fingi› ta› burturúr "prosessini", sum teir ætla›u. Teir vistu at teir fóru at tapa eina fólkaatkvø›u.

Tí skuldi heldur vera kaos og forvirringur, konfrontatión. Ein fíggindi og syndabukkur skuldi finnast. Varaløgma›ur hev›i betalt einum íslendskum serfrø›ingi, sum skuldi skriva eitt responsum, og prógva, at føroyingar vóru føroyingar. Sjálvt um Heimast‡rislógin og Ríkisins Grundlóg eru galdandi, skuldi Føroyar eisini vera ein tjó› (nation) í fólkarættarligari merking. Teir kundu spurt ein annan ella tíggju a›rar, og helst fingi› onnur svør. Men, ta› var júst hetta bestillingsarbei›i, sum skuldi brúkast politiskt til eina konfrontatión og provokatión.



Fólkarættur og nationalur rættur

Fólkarættur er ein skipan, sum ver›ur brúkt til at regulera vi›urskiftini millum suverenar statir. Tann nationali rætturin regulerar vi›urskiftini millum borgarar í einum suverenum stati. Stø›an er í dag tann, at Føroyar eru ein partur av Ríkisfelagsskapinum saman vi› Grønlandi. Tann suvereni staturin eitur Kongeriget Danmark. Har innanfyri eru tveir ríkispartar, sum hava serligar sjálvst‡risskipanir: Grønland og Føroyar. Kongaríki› Danmark, og harvi› Føroyar og Grønland, er limur í United Nations.

Henda stø›a kann broytast. Og ta› var ta›, sum "fullveldisprosessin" gekk út uppá.Lei›in skuldi vera: Samrá›ingar-Sáttmálauppskot-Løgtingssamtykt-Fólkaatkvø›a-Fullveldi. Men fullveldislandsst‡ri› tordi ikki at senda eitt uppskot vi› 4 ára skiftistí› til fólkaatkvø›u. Hetta er essensurin, úrdrátturin, av øllum tokutosinum.

Tí ste›ga›i processin upp. Tí tóku teir móti rá›um frá einum garvillum tjó›veldismanni, um at diskutera nationalistiska ideologi á samrá›ingarfundi á hægsta stigi. Galskapurin vann, skili› tapti.

Hvat ætla teir nú?

Ja, serliga varaløgma›ur, men eisini snórahundurin hjá honum, høvdu eitt mál á skránni. Ta› miseydna›ist. So nú hevur varaløgma›ur ikki meir at missa politiskt; tí lat ta› vera kaos. Lat okkum berjast manniliga móti fíggindanum. "Hava vit ongar fíggindar, so skapa vit teir sjálvir"

Samfelagsfrø›ingurin, sum plagar at tala síni vísdómsor›, hevur longu sagt vi› Jyllandspostin, at landsst‡ri› nú kann hugsast at ganga so langt, at teir vilja fáa onnur lond at leggja uppí. Well - so vita vit ta›.

Stø›an er heilt óvanlig - og hættislig

Teir áttu at lagt frá sær, og lati› veljararnar sagt sín demokratiska dóm. Varaløgma›ur átti at fingi› sær sess aftast í løgtinginum, so hann kundi lært politiskan fólkaskikk. Kanska blivi› myndugur, sum hann sjálvur plagar at taka til - um onnur. Men teir sleppa ikki maktini so lætt!

Ta› syrgiliga er, at hetta hevur skapt ein ómetaligan ótryggleika og forvirring millum fólk. "Hvat kunnu hesir menn ikki finna uppá?" ver›ur spurt.

Galskapurin rakar alt Føroya fólk. Vir›ingin fyri politikkarum í landsins lei›slu, og bá›um headmonnunum har, er slett ikki á nøkrum nullpunkti, hon liggur langt undir. Ta› er kalt í løtuni.

30.oktober 2000

SOLAR FØROYAR

Starvsfólk søkist at byrja skjótast

Arbeiðsuppgávur:
Talan er um fjølbroytt arbeiði í umfatar sølu av alarmútgerð, edv, tele og alt tað ein elinnleggjari hevur brúk fyri.

Førleikakrøv:
Kunnleiki innan handil hevur fyrimun.

Fyrispurningar og umsókn verður at senda til:

Solar Føroyar
Postboks 105
Brekkutún 2
110 Tórshavn
Tlf. 317933

Sosialurin - 311820

ítróttur

Nr. 210 • mikudagur • 1. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Spurningur um marki› av útlendskum leikarum



Nú tykist ivamál vera um, hvussu nógvum útlendskum leikarum eitt felag kann gera n‡tslu av

Ivamál tykist nú vera, hvørt ta› er loyvt at leika vi› trimum útlendskum leikarum á einum einum hondbóltsli›i. Fyri landskappingina merkir hetta, at ta› eisini er ivi um, hvørt Stjørnan og VÍF eru á odda í bestu kvinnudeildini

HONDBÓLTSREGLUR
Jákup Mørk

Seinnu árini er ta› vor›i› alt meira vanligt, at hondbóltsfeløgini her á landi hava styrkt um hópin vi› útlendskari arbei›smegi. Hetta er ein gongd, sum eisini kennist aftur frá ø›rum li›ítróttum, eitt nú fótbóltinum, og sum so man ta› heldur ikki vera nakar, i› hevur naka› ímóti hesum.

Tvørtur ímóti munnu nógv vera á einum máli um, at útlendsku leikararnir hava hækka› stø›i› í heimligu kapping okkara, og har umframt eisini hava veri› vi› til at ment føroysku leikararnar. Ta› er í mongum førum lærurík hjá leikarum okkara, tá teir í eitt tí›arskei› kanska fáa útlendskan venjara, sum kemur vi› n‡ggjara innspræning, ella kanska bara talan er um ein venjingarfelaga, sum hevur roynt seg á hægri stø›i.

Marki› er 20%

Ein spurningur í øllum hesum hevur tó veri›, hvussu nógvar útlendingar eitt felag kann gera n‡tslu av. Tosi› er kanska vor›i› serliga aktuelt í ár, har vit í kvinnuhondbóltinum hava sæ›, at tey bæ›i oddali›ini, Stjørnan og VÍF, hava gjørt n‡tslu av trimum útlendskum leikarum.

Hondbóltssambandi› hevur sum so ongar grei›ur reglur fyri hesum, og ivaleyst hava bæ›i Stjørnan og VÍF tí rokna› vi›, at tey ikki hava gjørt naka› skeivt, tá tey hava fingi› leikarar til landi›.

Mark er tó á, og er ta› Ítróttasamband Føroya, sum hevur ásett hetta.

Í grein 29 gjá ÍSF, undir pettinum, ymiskar ásetanir, stendur: »Um sersamband/-deildarsamband ikki hevur lógir ella regluger›, i› greitt siga, hvørjar treytir eru fyri luttøku, hava li› hjá hesum sersambandi/deildarsambandi, i› luttaka í Føroyameistaraskapinum í ítrótti, í mesta lagi loyvi at hava 20% av útlendingum á li›unum.

At Hondbóltssambandi› eigur at ganga undir hesa reglur, tykist als eingin ivi at vera um. Undir fyrsta pettinum av lógarpartinum hjá HSF, sum eitur »sambandi› millum HSF og ÍSF« ver›ur sta›fest, at øll feløg og sersambond undir ÍSF hava skyldu at akta lógirnar hjá sambandinum.

Tulkingarspurningur

Sostatt tykist einasti spurningur í hesum sambandi at vera, hvussu reglan vi› teimum 20 prosentunum eigur at tulkast. Talan kann ver›a um fleiri møguleikar, sum geva rúmd fyri ávíkavist einum, tveimum ella trimum leikarum.

Í »ringasta« førei er talan um prosentpartin av teimum leikarum, sum eru á vøllinum samstundis. Hett agevur 1,4 leikarar, sum ver›ur runda› til ein útlendskan leikara fyri hvørt li›i›.

Meira sannlíkt tykist tó vera, at ta› skal skiljast sum prosentparturin av 12 leikarum. Hetta gevur 2,4 leikarar, runda› av til tveir leikarar fyri li›i›.

Ein tri›i møguleiki, er, um tali› ver›ur rokna› av samla›a leikaratalinum í hópinum. Í hópinum kunnu nevnliga vera 16 leikarar, tó at bert 12 av hesum kunnu koma í dyst. Er hetta tal galdandi, fáast 3,2 leikarar burtur úr.

Er henda regla galdandi, kunnu li› altso hava tríggjar útlendskar leikarar vi› í hópinum, men hetta má so vera treyta› av, at hópurin telur í minsta lagi 13 leikarar, tí tá ber til at runda prosentpartin upp til tríggjar leikarar.

Spurningurin tykist sostatt at vera, hvussu hugtaki› »á li›num« í lógartekstinum hjá ÍSF skal skiljast. Er hetta tali› av leikarum á vøllinum, tali› av leikarum, sum eru í dysti, ella er ta› samla›a støddin á hópinum.

Hvat ger HSF

Eftir stendur so spurningurin, hvørja stø›u HSF tekur í hesum málinum.

Í fyrstu atløgu er allarhelst ney›ugt, at kappingarnevndin ger eina ni›urstø›u, tí hon hevur smb. regluger›ini heimild til at taka avger› í trætumálum í sambandi vi› kappinga.

Í ø›rum lagi kann talan gerast um, at ein a›al- ella eykaa›alfundur hjá HSF skal taka stø›u til, um HSF skal hava egnar reglur á økinum, solei›is sum vit kenna ta› frá fótbóltinum.

Harumframt má eisini setast spurnartekin vi›, hvussu HSF skal fara fram í málinum, um komi› ver›ur fram til, at hægst loyvda tali› er minni enn tríggir útlendingar.

Ta› kann ikki metast sum rættvíst, um Stjørnan og VÍF ver›a dømd at missa stig, sum tey hava vunni› á vøllinum. Neyvan hava tey fingi› útlendingar til landi›, uttan at hava spurt seg fyri, hvørjar reglur eru galdandi. Eisini fíggjarliga kann ta› gerast dyggur smeitur hjá hesum feløgum, um ta› nú vísur seg, at tey brádliga eru noydd at senda ein av útlendsku leikarunum heim aftur, og bert hava gjørt n‡tslu av hesum í ein fimtapart av kappingini.

Hvussu víkir og vendur, so kann í øllum førum sta›festast, og HSF ver›ur noytt at taka eina stø›u í málinum. Hondbólturin kann í øllum førum ikki liva vi›, at ivi skal vera um, hvørt eitt li› er fremst ella aftast í landskappingini.

At enda kann Stjørnan hevur n‡tt tríggjar útlendingar í trimum av sínum fimm dystum, me›an VÍF í øllum sínum dystum hava n‡tt tríggjar útlendskar leikarar.



b) At luttaka í dystum ella kappingum uttanlands.

Sambandið millum HSF og ÍSF

4. Øll sersambond og feløg innan ÍSF hava skyldu til :
   1) At akta lógir og reglur innan ÍSF.
   2) Ikki at taka lut í almennum ítróttastevnum, ítróttasýningum og kappingum, sum føroysk feløg uttan fyri ÍSF skipa fyri ella hava atgongd til, uttan at hava fingið loyvi frá starvsnevndini í ÍSF.
   3) At senda starvsnevnd ÍSF lógásettu frágreiðingarnar:

teirra er í samsvari við lógir og reglugerðir hjá avvarðandi sersambandi/deildarsambandi.
Um sersamband/deildarsamband ikki hevur lógir ella reglugerð, ið greitt siga hvørjar treytir eru fyri luttøku, hava lið hjá hesum sersambandi/deildarsambandi, ið luttaka í Føroyameistaraskapinum í ítrótti, í mesta lagi loyvi at hava 20% av útlandingum á liðunum.
Hevur sersamband/deildarsamband ikki lógir ella reglugerðir fyri hesum, kunnu bert føroyingar luttaka í

Reglurnar hjá HSF siga, at sersambandi› skal akta lógirnar hjá ÍSF um tey 20%